KFUK 1920 – 16. apríl – 2000

Motto: Ikki við mátti og ikki við megi, men við Tínum anda, sigur Harri herliðanna

Stovnari av KFUK og fyrsti skrivari var Henriette Hansen. Hon var skrivari frá 1920-1948

Fyri áttati árum síðan hin 16. apríl varð boðað til fundar í táverandi Meinigheitshúsi, nú býráðssalur.

Eitt skriv varð sent í hvørt heim í Havnini, tær innbodnu vóru ungar gentur og kvinnur. Kvøldið byrjaði við prædiku av Jákupi Dahl, prósti, síðan greiddi Henrietta Hansen, K.F.U.K. skrivari frá arbeiðnum.

Fyrsti fundurin um KFUK-arbeiðið varð í Meinigheitshúsinum 16. apríl 1920

K.F.U.K.

Bókstavirnir standa fyri Kristiligt felag fyri ungar kvinnur, men næstan beinanvegin varð tað fyri allar aldrar.

Deildirnar vóru:

Várgleði, smágentudeildin, fekk frk. Hansen frá eini havnarkvinnu, Honnu Hansen. Henda vildi so gjarna fara út í heidningalond at boða evangeliið, men so sjólætst hennara einasti beiggi, og hon kundi ikki fara frá foreldrunum, tó helt hon, at hon kundi byrjað eitt ytrimissiónsarbeið millum gentur, tað fekk seinni navnið Várgleði, og hetta arbeið gav hon frk. Hansen, ein einastandandi gáva givin við tí rætta kristiliga sinnalagnum.

Unggentudeildin frá 13 árum til 17.

Aðaldeildin frá 18 árum og uppeftir.

Allir fundir vóru og eru almennir, tó undantikið limafundunum, sum vóru og eru eina ferðina um mánaðan. Hesir fundir, sum byrjaðu í 1922, tá K.F.U.K. felagið varð stovnað, eru teir somu, sum fyrsta K.F.U.K. í Onglandi (fyrsta K. í heiminum) byrjaði við í 1855: Vit savnast um eina opnað bíbliu og felagsbøn.

Innihaldið í arbeiðnum

Sum tað liggur í navninum var og er tað eitt kristiligt arbeiði.

Í øllum deildum er andakt, síðan vóru og eru bíbliutímar, ytrimissión og ítriv av ymsum slagi og spøl.

Summarlegur vóru hæddin í arbeiðnum. Frk. Hansen vildi so fegin hava eina síka sama summarið; tí bleiv ytsta húsið á Tinganesi leigað og var hetta fyrsta summarlega í Føroyum. Her úti byrjaði so eisini arbeiðið við øllum tess greinum. Betri stað fannst ikki, tá hugsað verður um, at her var Jesus boðaður á fyrsta sinni í landi okkara. J. Waagstein, listamálari, ið var giftur við mostur frk. Hansen, gav okkum eitt varandi minni um hesa ríku hending við tí stóra málninginum, har Sigmund Brestison boðar Hvíta Krist. Í salinum í K.F.U.K. við Varðagøtu hongur hesin søguligi málningur og øll eru vælkomin at støkka inn á gólvið at síggja hann.

Frk. Hansen, sum hon altíð varð rópt, vaks upp suðuri í Vági, har okkara elsta K.F.U.K. varð stovnað 5. januar 1912. Pápin, ið var dani, doyði tá hon var 2 ára gomul, og mamman flutti við henni aftur til barnaheimið á Gørðunum.

Búmerkið hjá KFUK

KFUK hevði sítt virksemið í Tinganesi frá 1920 - 1922, tá húsini í Varðagøtu vórðu keypt

Sum vaksin á veg til Danmarkar, fortelur hon, at tá fjallatindarnir fóru undir, føldi hon seg so einsamalla og fór sostatt niður í kamarið, legði seg á knæ á dúrkið og gav seg og lív sítt til Jesus.

Hon tók læraraprógv niðri, fór síðan á Marthabo, har K.F.U.K. skrivarar tá fingu útbúgving, og í 1920 gjørdist hon ferðaskrivari innan K.F.U.K. Kallið, ið frk. Hansen fekk, var: *Føroya ungdómur fyri Kristus,* og helt hon, at Havnin hevði mesta ungdómin, tí her leitaðu øll til víðari skúlar og aðra útbúgving, og her var hon so í arbeiðnum í 28 ár.

Tað er ikki ov mikið sagt, at vit fáa ongan skrivara, ið kemur henni nær, bæði í andans og handans arbeiði. Tá frk. Hansen fór frá, fór hon í aðra tænastu, bønarinnar tænastu, og var hon í bøn alla tíðina meðan teir ymsu fundirnir varaðu.

Í ár minnast vit 80 ára dagin við einum limafundi í gl. Meinigheitshúsinum.

Jona Henriksen

Sigmundur boðar kristindómin á Tinganesi. Málningur eftir Jógvan Waagstein 1922

Flaggdagsrenningin

Sum vant skipar Bragdið, felagið fyri frælsa ítrótt í Havn, fyri renning Flaggdagin 25. apríl. Byrjað verður niðri við Gamla Apotekið kl. 16, men luttakararnir møta í Jotoholuni (miðbýnum) millum kl. 15.00 og 15.30 at fáa nummar handað. Teinurin er 7,2 km. Fyri tey eldru og 2 km fyri tey yngru. Tey eldru renna út eftir Havnargøtu og út á nýggja keiøkið, niðan aftur og yvur við Strond, har vent verður við Torgarðsgøtu. Heimaftur eftir Strandavegnum og Havnargøtu. Síðanni verður runnið runt um Café Natúr og rutuna einaferð enn. Tey yngru renna saman við teim eldru út á Nýggjakeiøkið at venda, men renna beina leið niðan til Gamla Apotek á mál.

Øll byrjað í senn, og sum vant verða tveir aldursbólkar Tey sum eru fødd í 87 ella seinni, og tey sum eru fødd í 86 ella fyrr.

Eins og undanfarin ár verður verður skipað fyri firmakapping bæði fyri kvinnur og menn. Stovnar, virkir, skúlar og arðar fyritøkur kunnu stilla upp við einum ella fleiri liðum, har minst 3 og hægst 5 eru á hvørjum liði, og har 3 tær bestu plaseringarnar telja við. Eins og undanfarin ár er tað Føroya Shell, sum stuðlar Flaggdagsrenningini, og síggja teir til, at skjótasti maður, kvinna, drongur og genta fáa steyp. Meðan nummar 1,2 og 3 í hvørjum bólki fáa heiðursmerki. Somuleiðis fáa vinnarnir av firmakappingini steyp til ognar.

Bragdið leggur dent á , at renningin er fyri øll yngri sum eldri, og minnir á at freistin fyri tilmelding er Leygardagin 22. Apríl. Lýst er næri í blaðnum.

Bilpakkar 2000 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

4 fólk í bili

Danmark
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hanstholm ella hinvegin
Fráf. Tórshavn 19/5 26/5 2/6 9/6 1/9 8/9
Fráf. Hanstholm 13/5 20/5 27/5 3/6 10/6 17/6 19/8 26/8 2/9
kr 775,- fyri hvønn

Noreg
Ferðist bíliga, Tórshavn-Bergen ella hinvegin
kr 480,- fyri hvønn

Hetland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Lerwick ella hinvegin
kr 385,- fyri hvønn

Ísland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Seyðisfjørður ella hinvegin
Fráf. Tórshavn 17/5 24/5 31/5 7/6 14/6 21/6 9/8 16/8 23/8 30/8
Fráf. Hanstholm 25/5 1/6 8/6 15/6 22/6 24/8 31/8 7/9
kr 728,- fyri hvønn

Skotland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hetland-Skotland ella hinvegin
kr 1.273,- fyri hvønn

e-mail: booking@smyril-line.fo

Frítíð artrygging er íroknað

stephanssons hús

Vælumtókta H-vindeyga í nýggjum búna

Nýggja H-vindeyga, ið er klætt við aluminium á útsíðuni, gevur framúr viðlíkahalds fyrimunir, samstundis sum umhvørvi og trivnaður innandura verður gingin á møti við límtræði. Nú kanst tú eisini velja millum topp- ella síðusving vindeygu, ið kunnu snarast runt, so tey eru løtt at vaska.

Vindeygað verður liðugt viðgjørt - lakk-sproytað - bæði innan og uttan, síðan verður tað klætt við aluminium í tí liti, tær dámar best.

Ring á 33 21 77 og bið om brochuru og legg summarfrítíðina til rættis!

Vatnsoyra Snikkaravirki pf. H
www.h-window.fo

10 ára trygd